# Fíggjarmálaráðið

**Løgtingið**

Dagfesting: 27.01.2020
Mál nr.: 20/00005
Málsviðgjørt: HKV
Eftirkannað: Lógartænastan dagfestir

**Løgtingsmál nr. xx/2019: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um eftirløn(eftirlønarlógin)**(Frítøka fyri uttanlandsinntøku, hækking av bundna inngjaldinum og javnbjóðis kapping millum eftirlønarveitarar)

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um eftirløn**
**(Eftirlønarlógin)**
(Frítøka fyri uttanlandsinntøku, hækking av bundna inngjaldinum og javnbjóðis kapping millum eftirlønarveitarar)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 49 frá 14 mai 2013 um eftirløn, sum broytt við løgtingslóg nr. 152 frá 20. desember 2013, løgtingslóg nr. 69 frá 30. apríl 2018, løgtingslóg nr. 133 frá 19. desember 2014, løgtingslóg nr. 157 frá 24. desember 2015, løgtingslóg nr. 44 frá 6. mai 2015 og løgtingslóg nr. 134 frá 19. desember 2014, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** § 1, stk. 9. verður strikað.

**2.** Í § 2, stk. 1 verður "12 prosent í 2026"  broytt til: "15 prosent í 2029"

**3.** Í § 2, stk. 1 verða sum nr. 14-16 sett:
"14) Frá 1. januar 2027: 13 prosent.
15) Frá 1. januar 2028: 14 prosent.
16) Frá 1. januar 2029: 15 prosent."

**4.** Í § 3 verður sum nr. 18 sett:
"18) Inntøka, sum er forvunnin fyri arbeiði uttanlands í starvi hjá arbeiðsgevara við heimstað uttanlands."

**5.** § 7, stk. 4 verður orðað soleiðis:
"*Stk. 4.* Eftirlønarsamansparingar í peningastovni, ið verða stovnaðar sbrt. hesi løgtingslóg, skulu verða samansettar soleiðis, at fíggjarligi váðin alla tíðina er hóskandi og gagnligur fyri samanspararan. Tá mett verður, um váðin er hóskandi, skal fyrilit havast fyri aldri, heilsu, fíggjarstøðu og øðrum viðkomandi viðurskiftum."

**6.** Í § 7 verða stk. 5 – 7 strikað, og stk. 8 og stk. 9 verða hereftir stk. 5 og stk. 6.

**§ 2**

*Stk. 1.* Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.
*Stk. 2.* § 3, stk. 1, nr. 18 sum ásett í § 1, nr. 4 hevur virkað frá og við inntøkuárinum 2019. Inngjøld til eftirløn, ið eru framd í 2019 og 2020 av inntøku, ið nú gerst frítikin, verða tó ikki goldin útaftur.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið

Mælt verður til tríggjar ymiskar broytingar:

1. **Eftirlønargjald av uttanlandsinntøku verður sjálvboðið**.
   Mælt verður til, at inntøka verður frítikin fyri bundna eftirlønargjaldið í teimum førum, har arbeiðsgevarin er útlendskur, og arbeiðið fer fram uttanlands.

2. **Bundna inngjaldið hækkar aftur.**
   Undanfarna samgonga lækkaði bundna inngjaldið úr 15% niður í 12%. Lækkingin var í nógvar mátar óheppin, og mælt verður tí til at hækka inngjaldið aftur.

3. **Tryggja javnbjóðis kapping millum eftirlønarveitarar.**
   Felagið peningastovnar hevur víst á, at peningastovnar – og tey sum spara upp til eftirløn í peningastovnum – sambært galdandi reglum eru fyri mismuni. Mælt verður til somu treytir fyri peningastovnar sum fyri aðrar eftirlønarveitarar.

### 1.2. Galdandi lóggáva

*1. Uttanlandsinntøka*
Tey, ið arbeiða uttanlands, og sum rinda til eftirløn uttanlands, kunnu – um tey rinda til eina útlendska eftirlønarskipan, sum lýkur ávísar treytir – verða undantikin at rinda til eftirløn í Føroyum av uttanlandsinntøkuni. Víst verður í hesum sambandi til kunngerð nr. 165 frá 19. desember 2013.

Hóast krøvini í fleiri umførum eru gjørd meira lagalig, hevur tað víst seg trupult at gera lóggávuna hóskandi.

Tað eru í løtuni gott 400 persónar, ið hava fingið játtað undantak, men talan er næstan bara um persónar undir DIS, og persónar sum eru fevndir av tvungnari uppsparing í Grønlandi. Tey mongu, sum arbeiða í t.d. Noregi ella sigla undir øðrum skipanum, hava trupult við at fáa undantak, tí teirra skipanir eru so ymiskar frá Eftirlønarlógini. Tað eru í løtuni meira enn 800 persónar sum rinda til eftirløn í Føroyum av uttanlandsinntøku.

Óansæð um undantak verður veitt ella ikki, so er í báðum førum talan um eina skipan, ið hevur við sær nógva umsiting, bæði fyri TAKS og fyri skattgjaldaran. Skipanin hevur havt við sær nógv kærumál, og tað er í heila tikið stórur illvilji millum tey sum arbeiða uttanlands ímóti eftirlønargjaldinum, og tey ynskja sær størri frælsi til at velja útlendska skipan.

*2. Bundna inngjaldið*
Bundna inngjaldið er 6% í 2020. Tað hækkar 1% hvørt ár, soleiðis at tað í 2026 verður 12%.

Tá Eftirlønarlógin kom í gildi var ætlanin, at gjaldið skuldi hækka til 15%. Men, í sambandi við pensjónsnýskipanina hjá undanfarnu samgongu, sum kom í gildi 1. januar 2019, varð gjaldið lækkað niður í 12%.

Hetta kann hava við sær, at uppsparingin við tíðini gerst 1/5 minni, og tað hevur týdning bæði fyri haldføri landskassans, og fyri fíggjarstøðuna hjá teimum eldru í pensjónsárunum. At lækkingin av bundna inngjaldinum førir til verri haldføri vísti m.a. Landsbankin á í sínum hoyringsskrivið, tá uppskotið var lagt fram av undanfarnu samgongu.

Eisini er tað soleiðis, at tá eldraøkið varð lagt til kommunurnar var skatturin av pensjónsinngjøldunum sjálvur bulurin í fíggingini, og orsøkin var tann, at talan var um játtan, sum er vaksandi – eins og talið av eldri er vaksandi. Lækkingin av bundna inngjaldinum – sum undanfarna samgonga framdi – hevur tí við sær, at kommunurnar fáa væl minni til rakstur av eldraøkinum enn teimum var lovað, tá tær yvirtóku økið.

*3. Tryggja javnbjóðis kapping millum eftirlønarveitarar*
Eftirlønarlógin hevur ásetingar um, hvussu uppsparing til eftirløn skal støðlast fíggjarliga. Krøvini til eftirlønargrunnar og tryggingarfeløg eru einans yvirskipað, har víst verður til at halda galdandi lóggávu, og at vísa fyrilit fyri umstøðum samanspararans.

Men hinvegin eru viðvíkjandi peningastovnum ítøkilig krøv um, hvussu uppsparingin skal verða samansett í mun til aldur eigarans. Ásetingin í § 7, stk. 4 er soljóðandi:

> *Stk. 4.* Eftirlønarsamansparari í peningastovni kann einans hava íløgur í børsskrásett virðisbrøv har partabrævaparturin fylgir talvuni niðanfyri.

| *Aldur í ár* | *Partabrævapartur í mesta lagi* |
|---|---|
| - 34 | 80 prosent |
| 35 - 44 | 70 prosent |
| 45 - 49 | 60 prosent |
| 50 - 59 | 50 prosent |
| 60 - 64 | 40 prosent |
| 65 - 69 | 30 prosent |
| 70 - | 15 prosent |

Felagið Peningastovnar hevur víst á, at ásetingin minkar munandi um avkastið hjá teirra kundum, og at hetta ger teirra kappingarstøðu verri í mun til aðrar veitarar, tí tey, ið ynskja sær eitt hægri váðastøðið frávelja peningastovnarnar.

Eisini kann leggjast aftrat, at Eftirlønarlógin neyvan er tann rætta til at lóggeva um, hvussu ein pensjónsuppsparing ítøkiliga skal verða samansett. Hetta eigur at verða gjørt í teimum lógum og kunngerðum, ið regulera peningastovns- og tryggingarøkið (lov om finansiel virksomhed, Tryggingarlógin o.s.fr.).

## 1.3. Endamálið við uppskotinum

*1. Viðvíkjandi uttanlandsinntøku*
Her hevur samgongan bundið seg til at gera broytingar. Víst verður til samgonguskjalið, har tað stendur:

> "Um rindað verður til eftirløn uttanlands, eigur hetta at verða mótroknað í kravdu eftirlønaruppsparingini í Føroyum."

Fíggjarmálaráðið hevur kannað málið, og hugt eftir, hvussu skipanin kann gerast meira lagalig, soleiðis at fleiri undantøk kunnu gevast. Niðurstøðan er, at tað verður sera trupult at fremja í verki, uttan at tað fer at hava við sær stóra øking í umsitingini av skipanini.

At umsita verandi undantøk er longu rættiliga krevjandi, tí at tey, sum eru undantikin, skulu regluliga senda inn váttanir og uppgerðir. Gerst lóggávan uppaftur meira kompleks verður umsitingin fleirfaldað.

Eisini má havast í huga, at um skipanin verður soleiðis, at tey flestu verða undantikin, so er tað nógv einfaldari og betur at frítaka alla uttanlandsinntøku frá inngjaldið. So sleppa bæði skattgjaldarin og Taks undan nógvu umsitingini.

Tað er, stutt sagt, ikki skynsamt at hava eitt krav í lógini, har nærum øll verða undantikin.

So tað ber til at siga, at valið stendur ímillum: (1) at varðveita galdandi reglur, og (2) at frítaka alla uttanlandsinntøku.

Mælt verður tí til, at persónar, ið arbeiða uttanlands hjá útlendskum arbeiðsgevara, verða frítiknir at rinda til eftirløn av uttanlandsinntøkuni. Men hava teir føroyska inntøku aftrat uttanlandsinntøku skulu teir tó rinda av føroysku inntøkuni. Tey við uttanlandsinntøku, ið ynskja at rinda til eftirløn í Føroyum kunnu tó framvegis gera tað. Men tey sleppa nú undan einum árligum kravi frá TAKS.

*2. Viðvíkjandi bundna gjaldinum*
Mælt verður til at gjaldið verður hækkað aftur upp í 15%, sum var tann upprunaliga ásetingin.

*3. Tryggja javnbjóðis kapping millum eftirlønarveitarar*
Her verður mælt til, at somu ásetingar verða galdandi fyri peningastovnar sum fyri aðrar eftirlønarveitarar. Tað vil siga, at talvan í §7, stk. 4 verður strikað.

## 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Uppskotið hevur við sær:

- At inntøka forvunnin uttanlands fyri útlendskam arbeiðsgevara verður frítiknin kravinum um, at rinda til eftirløn í Føroyum. Hetta verður í staðin sjálvboðið.
- At bundna inngjaldið hækkar stigvíst við 1% árliga upp í 15% frá 1. januar 2029, í staðin fyri upp í 12% frá 1. januar 2026. Farið verður sostatt aftur til upprunaligu ásetingina.
- At ásetingarnar í eftirlønarlógini um, hvussu uppspard eftirløn skal verða samansett, nú verða tær somu í peningastovnum sum í lívstryggingarfeløgum og eftirlønargrunnum.

**1.5. Ummæli og ummælisskjal**

Umframt at hava ligið alment frammi á hoyringarportalinum hjá Føroya Landsstýri, so er uppskotið eisini sent til ummælis hjá hesum hoyringarpørtum:

**Almennir myndugleikar og stovnar:**
Almannamálaráðið
Almannaverkið
Brúkaraumboðið
Fiskimálaráðið
Kommunufelagið
Heilsu- og Innlendismálaráðið
Kappingareftirlitið
Løgmansskrivstovan
Mentamálaráðið
Ríkisumboðið og stovnarnir undir statinum
Tryggingareftirlitið
Uttanríkis- og Vinnumálaráðið
TAKS

**Arbeiðsgevarar:**
Føroya Arbeiðsgevarafelag (Vinnuhúsið)
Føroya Reiðarafelag
Kommununala Arbeiðsgevarafelag Føroya

**Áhugabólkar:**
Landsfelag Pensjónista
Meginfelag teirra, ið bera brek í Føroyum
Antares

**Eftirlønarveitarar:**
Betri Pensjón
Felagið Peningastovnar
Lív

**Fakfeløg:**
Akademikarafelag Føroya
Heilsurøktarafelagið
Arkitektafelag Føroya
Bioanalytikarafelagið
Búskapar- & Løgfrøðingafelag Føroya
Ergoterapeutfelagið
Fakfelag Sjómansskúlalærara í Føroyum
Farmakonomforeningen
FAS Serlæknafelag Føroya
Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar
Felagið Maskinmeistaralærarar
Føroya Arbeiðarafelag
Føroya Fiskimannafelag
Føroya Handverkarafelag
Føroya Lærarafelag

Føroya Musikklærarafelag
Føroya Prentarafelag
Føroya Skipara- og Navigatørfelag
Føroya Tekniska Lærafelag
Fysioterapeutfelag Føroya
Havnar Arbeiðmannafelag
Havnar Arbeiðskvinnufelag
Havnar Handverkarafelag
Heilsuhjálparafelag Føroya
Heilsurøktarfelag Føroya
Hjálparlæknaráð Føroya
Samstak
Landsfelag Handverkaranna
Ljósmøðrafelag Føroya
Magistarafelag Føroya
Akademikarafelag Føroya
Maskinmeistarafelagið
Pedagogfelagið
Rithøvundafelag Føroya
S & K Felagið
Starvsmannafelagið
Sosialráðgevarafelag Føroya
Tænastumannafelagið
Yrkisfelag Studentaskúla- og HF-lærara
YTF
Prestafelagið

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

*1. Uttanlandsinntøka*
Í 2018 vóru 816 persónar, sum rindaðu til eftirløn av útlendskari inntøku. Hesi rindaðu umleið 4 mió. kr. í pensjónsskatti. Pensjónsskatturin fellur til kommunurnar allur sum hann er.

*2. Viðvíkjandi bundna gjaldinum*
Mett verður, at hækkingin í bundna inngjaldinum hevur við sær eyka inntøku í pensjónsskatti á 17 mió. kr. í 2027, 33 mió. kr. í 2028 og síðan 50 mió. kr. frá 2029. Pensjónsskatturin fellur til kommunurnar allur sum hann er.

*3. Mismunur millum eftirlønarveitarar*
Hevur ikki nakrar beinleiðis fíggjarligar avleiðingar fyri tað almenna. Men kann sum frálíður hava jaligar avleiðingar fyri tey, sum hava pensjónsuppsparing í peningastovnum.

### 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið um at strikað kravið um eftirlønargjald av uttanlandsinntøku hevur jaligar umsitingarligar avleiðingar fyri TAKS. Tey sleppa nú undan nógvu umsitingini, ið er av núverandi skipan.

### 2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Uppskotið hevur jaligar avleiðingar fyri peningastovnar. Teir verða nú javntsettir við aðrar veitarar, tá tað kemur til íløgureglurnar í Eftirlønarlógini.

Eisini er hækkingin í bundna gjaldinum til fyrimuns fyri føroyskar eftirlønarveitarar sum heild, tí hetta økir um inngjøldini frameftir.

Hinvegin kann frítøkan fyri uttanlandsinntøku hava við sær færri inngjøld til føroyskar eftirlønarveitarar.

### 2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

### 2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

### 2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Uppskotið hevur jaligar avleiðingar fyri tey, sum arbeiða uttanlands fyri útlendskan arbeiðsgevara. Tey kunnu nú sjálvi gera av, um tey vilja rinda til eftirløn í Føroyum.

### 2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri millumtjóðasáttmálar á økinum.

### 2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri tvørgangandi millumtjóðasáttmálar.

**2.9. Markaforðingar**
Uppskotið ger tað smidligari at arbeiða uttanlands hjá útlendskum arbeiðsgevara, og tekur tí burtur eina markaforðing.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**
Uppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Uppskotið hevur ikki nakrar beinleiðis ásetingar um skatt og avgjøld.

**2.12. Gjøld**
Uppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Uppskotið tekur burtur skylduna hjá teimum, sum arbeiða uttanlands at rinda til eftirløn í Føroyum, ella til at søkja um undantak.

Hinvegin áleggur uppskotið øllum, ið eru fevnd av lógini, eina skyldu at rinda eitt hægri inngjald í framtíðini.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
Uppskotið leggur ikki heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Uppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Uppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

## 2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Ja | Nei | Ja | Ja |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Ja | Ja |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

**Til § 1, nr. 1**

§ 1, stk. 9 verður strikað. Hetta hongur saman við broyting nr. 4, har inntøka, sum er forvunnin fyri arbeiði, ið er farið fram uttanlands í starvi hjá arbeiðsgevara við heimstað uttanlands, nú verður nevnd millum undantøkini í § 3. Hetta hevur við sær, at ásetingin í §1, stk. 9 ongan týdning hevur longur, tí øll tann inntøka, sum ásetingin hevði týdning fyri, nú verður undantikin av sær sjálvum.

**Til § 1, nr. 2 og 3**
Sambært galdandi lóg hækkar bundna inngjaldið við 1% árliga, soleiðis at tað verður 12% frá 1. januar 2026. Nú verður farið aftur til, at hækkingin heldur áfram til 1. januar 2029, soleiðis at tað verður 15% frá 1. Januar 2029.

**Til § 1, nr. 4**
§ 3, stk. 1 ásetur hvørjar upphæddir ikki eru fevndar av kravda gjaldinum í § 2, stk. 1.

Inntøka, sum er forvunnin fyri arbeiði, ið er farið fram uttanlands í starvi hjá arbeiðsgevara við heimstað uttanlands, verður nú nevnd millum undantøkini. Hetta hevur við sær, at tað ikki longur er krav at rinda til eftirløn í teimum førum har hesi bæði krøv eru uppfylt:

1. Arbeiði fer fram uttanlands.
2. Arbeitt verður fyri arbeiðsgevara við heimstað uttanlands.

Hóast hesar inntøkur nú verða frítiknar, so er tað ikki soleiðis, at tað verður bannað at rinda til eftirløn sbrt. eftirlønarlógini av slíkari inntøku. Eins og flestu onnur kunnu hesir persónar, rinda til eftirløn, men talan er tá um sjálvboðið inngjald.

Eisini verður gjørt vart við, at um persónur, ið hevur uttanlandsinntøku frá útlendskum arbeiðsgevara, harumframt eisini hevur inntøku, ið er innvunnin í Føroyum, ella innvunnin fyri føroyskan arbeiðsgevara, so er tann inntøkan ikki frítikin. Tí persónurin og tann "føroyska" inntøkan eru framvegis fevnd av ávikavist § 1 og § 2 í lógini.

**Til § 1, nr. 5**
§ 7, stk. 4 verður orða av nýggjum. Talvan við áseting um, hvussu samansetingin skal verða millum virðisbrøv og partabrøv verður tikin burtur. Í staðin kemur sama áseting, sum longu er galdandi fyri eftirlønargrunnar og lívstryggingarfeløg (sí § 8, stk. 2).

**Til § 1, nr. 6**
Í § 7 verða stk. 5 – 7 strikað. Hesar ásetingar hava onki endamál longur, tí tær snúgva seg um talvuna í § 7, stk. 4, og hon verður strikað í sambandi við broyting nr. 5.

**Til § 2**
Áseting um gildiskomu.

Frítøkan av inntøku forvunnin uttanlands fyri útlendskan arbeiðsgevara hevur virknað frá inntøkuárinum 2019. Tað vil siga, at inngjald til eftirløn av nevndu inntøku verður ikki kravt fyri inntøku forvunnin í 2019. Hetta ber til, tí fyri útlendska inntøku verður inntøkuárið 2019

ikki endaliga uppgjørt fyrr enn á heysti 2020. Hetta er at lóggeva afturvirkandi, men tað er til fyrimuns fyri borgaran, og mett verður, at tað bæði hevði verið órímiligt og órationelt, at farið undir at kravt hesi inngjøld inn í heyst, um hesar inntøkur frameftir fara at verða undantiknar.

Inngjøld til eftirløn, ið eru framd í 2019 og 2020 av inntøku, og sum nú verður frítikin, verða tó ikki goldin útaftur. Orsøkin er, at skulu hesi rindast útaftur, hevur tað nógva umsiting við sær bæði fyri eftirlønarveitarar og fyri TAKS. Tað hevði í hvørjum einstøkum føri havt við sær, at skattskyldug inntøka, eftirlønarskattur, vanligur skattur o.a. skal rættast o.s.fr.

Fíggjarmálaráðið, xx.01.2020.

**Jørgen Niclasen**
landsstýrismaður

/ Bjarni Askham Bjarnason

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2:
Fylgiskjal 3:

**Fylgiskjal 1**

## Javntekstur

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

| Galdandi orðingar | Løgtingslógaruppskotið |
|---|---|
| | **§ 1**<br><br>Í løgtingslóg nr. 49 frá 14 mai 2013 um eftirløn, sum broytt við løgtingslóg nr. 152 frá 20. desember 2013, løgtingslóg nr. 69 frá 30. apríl 2018, løgtingslóg nr. 133 frá 19. desember 2014, løgtingslóg nr. 157 frá 24. desember 2015, løgtingslóg nr. 44 frá 6. mai 2015 og løgtingslóg nr. 134 frá 19. desember 2014, verða gjørdar hesar broytingar: |
| **§ 1.**<br>…<br>*Stk. 9.* Tað í stk. 1 álagda eftirlønargjaldið verður lækkað í tann mun, eftirlønarsamansparari á sína eftirlønarkontu fær goldið gjaldsundantøkutrygging. Í sambandi við útrokning av lækking verða inngjøld frá gjaldsundantøkutrygging bruttofiserað sbrt. skattaprosentinum í § 12, stk. 2. | **1.** § 1, stk. 9. verður strikað. |
| **§ 2.** Bundna eftirlønargjaldið er frá 1. januar 2014 í minsta lagi 1 prosent av A-inntøkuni og B-inntøkuni, og eftirlønargjaldið hækkar til 12 prosent í 2026 og seinni, soleiðis:<br>1) Frá 1. januar 2014: 1 prosent.<br>2) Frá 1. januar 2015: 2 prosent.<br>3) Frá 1. januar 2016: 2 prosent.<br>4) Frá 1. januar 2017: 3 prosent.<br>5) Frá 1. januar 2018: 4 prosent.<br>6) Frá 1. januar 2019: 5 prosent.<br>7) Frá 1. januar 2020: 6 prosent.<br>8) Frá 1. januar 2021: 7 prosent.<br>9) Frá 1. januar 2022: 8 prosent.<br>10) Frá 1. januar 2023: 9 prosent. | **2.** Í § 2, stk. 1 verður “12 prosent í 2026” broytt til: “15 prosent í 2029” |

| | |
|---|---|
| 11) Frá 1. januar 2024: 10 prosent.<br>12) Frá 1. januar 2025: 11 prosent.<br>13) Frá 1. januar 2026: 12 prosent. | **3.** Í § 2, stk. 1 verða sum nr. 14-16 sett:<br>“14) Frá 1. januar 2027: 13 prosent.<br>15) Frá 1. januar 2028: 14 prosent.<br>16) Frá 1. januar 2029: 15 prosent.” |
| **§ 3.** Tað í § 2, stk. 1 ásetta prosentgjaldið verður ikki rindað av niðanfyri nevndu peningaupphæddum:<br>1) Vinningi av eydnuspæli, legati, sømdargávu og líknandi.<br>2) Útgjaldi sambært løgtingslóg um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn.<br>3) Uppihaldspeningi sambært hjúnabandslóggávuni.<br>4) Útgjaldi sambært løgtingslóg um ættleiðingarstuðul.<br>5) Útgjaldi sambært løgtingslóg um lestrarstuðul.<br>6) Útgjaldi av tryggingarupphædd og líknandi.<br>7) Útgjaldi sambært løgtingslóg um tænastumannaeftirlønir.<br>8) Útgjaldi av lutaeftirløn.<br>9) Útgjaldi av lívrentu og líknandi.<br>10) Útgjaldi sambært løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk, tó undantikið útgjaldi sambært §§ 12, 14, 22 og 25.<br>11) Útgjaldi sambært løgtingslóg um viðbót til ávísar pensjónistar v.fl.<br>12) Útgjaldi sambært løgtingslóg um barnagjald til einsamallar uppihaldarar o.fl.<br>13) Útgjaldi sambært løgtingslóg um almannapensjónir o.a.<br>14) Útgjaldi sambært forsorgarlógini, tó undantikið útgjald sambært § 9, stk. 2, § 13 og § 17, stk. 3.<br>15) Útgjaldi sambært løgtingslóg um stuðul til uppihaldspening.<br>16) Útgjaldi sambært kunngerð um samsýning til fosturforeldur, tó undantikið útgjald sambært § 1, stk. 1.<br>17) Inntøka forvunnin í Grønlandi, sum tvungin eftirløn skal rindast av sbrt. Inatsisartutlov nr. 21 af 28. november 2016 om obligatorisk pensionsordning. | **4.** Í § 3 verður sum nr. 18 sett:<br>“18) Inntøka, sum er forvunnin fyri arbeiði uttanlands í starvi hjá arbeiðsgevara við heimstað uttanlands.” |

| | |
|---|---|
| *Íløgureglur fyri peningastovns-eftirlønarveitarar* | |
| **§ 7.** Eftirlønarsamansparingar í peningastovni, skulu vera á serligum eftirlønarinnlánskontum, í puljum ella serligum virðisbrævagoymslum.<br>*Stk. 2.* Í eftirlønarhøpi í sambandi við virðisbrævahandil skal eftirlønarsamansparararin í peningastovni fylgja teimum til eina og hvørja tíð galdandi reglum, sum eru galdandi fyri at verja íleggjaran.<br>*Stk. 3.* Uppspard eftirløn skal støðlast sambært teimum reglum, ið eru galdandi fyri at tryggja nøktandi váðaspjaðing. Eftirlønarveitarin fremur virðisbrævahandilin vegna eftirlønarsamanspararan.<br>*Stk. 4.* Eftirlønarsamansparari í peningastovni kann einans hava íløgur í børsskrásett virðisbrøv har partabrævaparturin fylgir talvuni niðanfyri.<br><br>**Aldur í ár** **Partabrævapartur í mesta lagi**<br>- 34 80 prosent<br>35 - 44 70 prosent<br>45 - 49 60 prosent<br>50 - 59 50 prosent<br>60 - 64 40 prosent<br>65 - 69 30 prosent<br>70 - 15 prosent | **5.** § 7, stk. 4 verður orðað soleiðis:<br>"*Stk. 4.* Eftirlønarsamansparingar í peningastovni, ið verða stovnaðar sbrt. hesi løgtingslóg, skulu verða samansettar soleiðis, at fíggjarligi váðin alla tíðina er hóskandi og gagnligur fyri samanspararan. Tá mett verður, um váðin er hóskandi, skal fyrilit havast fyri aldri, heilsu, fíggjarstøðu og øðrum viðkomandi viðurskiftum." |
| *Stk. 5.* Tá partabrævaparturin hjá einum persóni er oman fyri hámarkið, sum er ásett í talvuni í stk. 4, verður rebalanserað.<br>*Stk. 6.* Persónur, yngri enn 60 ár, verður ikki álagdur at selja av partabrævagoymslu, hóast virðið av partabrævapartinum er oman fyri tað hægst loyvda. Rebalanserað verður soleiðis, at íløgur bert kunnu verða gjørdar í lánsbrøv, inntil partabrævaparturin er komin niður á hægst loyvda markið fyri partabrævapartin sambært stk. 4.<br>*Stk. 7.* Hjá persóni, ið er 60 ár ella eldri, skal íløgurøðin rebalanserast niður á hægst loyvda partabrævapart í seinasta lagi fyrsta handilsdag eftir, at persónurin er fyltur | **6.** Í § 7 verða stk. 5 – 7 strikað, og stk. 8 og stk. 9 verða hereftir stk. 5 og stk. 6. |

| | |
|---|---|
| ávikavist 60, 65 og 70 ár, sum ásett í talvuni í stk. 4.<br>*Stk. 8.* Virðisbrævagoymslan verður gjørd upp til marknaðarvirðið í seinasta lagi 2 mánaðir fyri, at eftirlønarsamansparari ynskir at byrja útgjald, og í fyrsta lagi 2 mánaðir fyri, at eftirlønarsamansparari nær fólkapensjónsaldri sbrt. lóg um almannapensjónir, tó í seinasta lagi 2 mánaðir fyri, at eftirlønarsamansparari fær fólkapensjón sbrt. lóg um almannapensjónir.<br>*Stk. 9.* Tað er skylda hjá eftirlønarveitara at tryggja, at ásetingarnar í hesi grein verða fylgdar. | **§ 2**<br><br>*Stk. 1.* Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.<br>*Stk. 2.* § 3, stk. 1, nr. 18 sum ásett í § 1, nr. 4 hevur virkað frá og við inntøkuárinum 2019. |